# Heðin: Betri eftirlit við hvørjari krónu

**Tórshavnar kommuna hevur nú gjørt eina skipan, har ein kann hava betri eftirlit við bygging, innkeypum og aðrari peninganýtslu í kommununi. Sleppast skal undan óhepnum dømum, har ein bygging verður nógv seinkað og tí helst eisini munandi dýrari**

KOMMUNA
*Snorri Brend*

**Tórshavn:** Tað er mangan so, at ávísir trupulleikar kunnu taka seg upp tá kommunan letur ein bygning byggja. Er onkur størri trupulleiki um tíðarætlan ella kostnað, hevur spurningurin higartil verið, hvagar ein skuldi fara við hesum trupulleikanum.

Seinasta dømið í hesum sambandi er útbyggingin av skúlanum í Kollafirði, har trupult hevur verið at komið til botns í, hvør hevur ábyrgdina fyri óhepnu støðuni.

Nú hevur kommunan so skorið út í papp, hvør tað er sum hevur ábyrgdina, tá kommunan letur ein bygning byggja, eins og ein hevur gjørt greitt hvør hevur eftirlitið við hesum.

Hereftir verður nevniliga skipaður ein eftirlitsbólkur sum kemur at hava ábyrgdina og eftirlitið við byggingum og peninganýtsluni annars.

Hvørt einasta ár keypir kommunan fyri nógvan pening í innbúgvi og útgerð, og nú skal skipast so fyri, at hesi keypini verða boðin út millum fleiri fyritøkur. Nú skal haraftrat verða liðugt at keypa frá tí fyrsta og besta seljaranum, og frá tí sum kemur við teirri smartastu vøruni.

- Vit ynskja at sleppa undan illgrunanum hjá fólki um, at vit geva ávísum fyritøkum fyrimunir fram um aðrar.

- Okkara hægsta ynski er at fáa so nógv fyri peningin sum gjørligt. Og tað gera vit m.a. við hesum stórdriftsfyrimuninum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hann vil ikki seta nakað tal uppá, hvussu nógvan pening, ið kommunan kann spara við hesi nýggju mannagongdini.

- Men her er nógvur pening at spara. Eingin ivi um tað, sigur Heðin Mortensen.

Á býráðsfundi hóskvøldið vórðu hesar nýggju fyrisitingarligu mannagongdirnar samtyktar, og sum galda fyri allar verkætlanir ið skulu fíggjast av konto'um hjá kommununi.





"Det er fedt, at du i tre måneder kan koncentrere dig 100% om dit arbejde og så bagefter har tre måneder, hvor du har fri."

*Jonathan, skibsofficersstuderende*

Du er klar til en uddannelse, der udfordrer både dine boglige og tekniske færdigheder. Som hurtigt giver dig muligheden for at prøve kræfter med dit fremtidige job i en af verdens største handelsflåder. Og som kræver, at du kan fastholde det store overblik såvel som fokus på detaljen.

Læs meget mere om uddannelsen og jobbet på **maersk-skibsofficer.dk**, hvor du også kan bestille informationsmateriale og ansøgningsskema samt sende din ansøgning online. Kommer du i betragtning, modtager du herefter indkaldelse til en optagelsesprøve. Du kan også ringe til os på **+45 3398 7000**.

Gør tanke til handling allerede i dag!

MÆRSK

maersk-skibsofficer.dk

# Havnar Bio

kall Coca-Cola




## Cinderella Man

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 19.09 | kl. 19.00 | kl. 22.00 |
| Týsdag | 20.09 | kl. 19.00 | kl. 22.00 |
| Mikudag | 21.09 | kl. 19.00 | kl. 22.00 |
| Hósdag | 22.09 | kl. 19.00 | kl. 22.00 |




## Kung Fu Hustle

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 19.09 | kl. 20.45 | |
| Týsdag | 20.09 | kl. 20.45 | |
| Mikudag | 21.09 | kl. 20.45 | |
| Hósdag | 22.09 | kl. 20.45 | *Seinasta sýning* |




## Amityville Horror

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 19.09 | kl. 23.00 | |
| Týsdag | 20.09 | kl. 23.00 | |
| Mikudag | 21.09 | kl. 23.00 | |
| Hósdag | 22.09 | kl. 23.00 | Seinasta sýning |




## Madagascar

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 19.09 | kl. 17.00 |
| Týsdag | 20.09 | kl .17.00 |
| Mikudag | 21.09 | kl. 17.00 |
| Hósdag | 22.09 | kl. 17.00 |




## Skeleton Key

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 19.09 | kl. 18.30 | |
| Týsdag | 20.09 | kl. 18.30 | |
| Mikudag | 21.09 | kl. 18.30 | |
| Hósdag | 22.09 | kl. 18.30 | *Seinasta sýning* |




## Herbie

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 19.09 | kl. 16.15 |
| Týsdag | 20.09 | kl. 16.15 |
| Mikudag | 21.09 | kl. 16.15 |
| Hósdag | 22.09 | kl. 16.15 |

## Komandi filmar

**40 year old virgin** *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 23.09 kl. 21.15 kl. 23.30

**Charlie og chokoladefabrikken** *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 23.09 kl. 19.00 kl. 20.45

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**